# Blandað bomm!

ANDREA HEINDRIKSDÓTTIR



forkvinna í skúlastýrinum fyri Tórshavnar Kommunuskúla

**10. floksætlan í Tórshavnar kommunu og heildarætlan fyri Tórshavnar Kommunuskúla – tvey ymisk mál!**

Tað er hugstoytt at Tórshavnar Kommunu ger hvønn næming upp í pengum, ístaðinfyri at taka atlit til námsfrøðina, sum skal bera næmingarnar fram á leið.

Marin Katrina Frýdal hevur eitt lesarabræv í bløðunum í vikuni. Brævið er ein undarlig avdúking av, hví 10.floksnæmingar í Kommunuskúlanum eftir hennara tykki koma at gera, at røktarheim í kommununi verða útsett í ókendar tíðir. Ein heilt sjaldsamur påstandur, sum ein bara kann standa púra spyrjandi yvir fyri, serliga tá veruleikin er tann, at Býráðið fyri kortum samtykti at hækka skattaprosentið í kommununi við 1%, við tí fyri eyga at byggja eitt røktarheim.

Hví skal 10. flokkur fara at kosta so ómetaliga nógv knappliga, hann hevur verið í skúlanum í so mong ár uttan nakran eyka kostnað? Tað er ein løgin máti at umrøða skúla uppá - , bygningar og milliónir, og bert tað. Hví ikki viðgera tað, sum tað snýr seg um, tað námsfrøðiliga, tað innihaldsliga ?

Í álitinum um 10.flokk, varð lagt upp til at, sjálvstøðugur bygningur skuldi byggjast til 10. flokk, sjálvstøðug leiðsla skuldi verða og at lærarar burturav skuldu arbeiða í 10.flokki. Nú vit skriva 2009 eru ongar av hesum fortreytunum til staðar, og tí kann hettar álitið, ikki gerast grundarsteinur undir komandi 10.floksundirvísingini í Tórshavnar kommunu.

Tíðin er komin at kalla ein spaka fyri ein spaka. Um Tórshavnar býráð vil sleppa undan at seta í verk, leingi umrøddu, heildarætlanina fyri Tórshavnar Kommunuskúla, har bygningar skúlans verða dagførdir eftir eini ætlan, sum býráðið hevur gjørt saman við skúlanum og arkitekti, so er bara at siga tað, sum tað er.

Tað er skylda hjá kommunala myndugleikanum at dagføra skúlabygningar. Hetta hevur í nógv ár ligið á láni, og tí er støðan, sum hon er. Seinastu býráðssetu eru pengar settir av til nýggjar skúlabygningar og umvælingar á verandi skúlum í kommununi, og tað er gleðiligt.

Men nú, farast skal undir at dagføra størsta skúlan í kommununi, er vent í holuni.

Tórshavnar býráð hevur sjálvt lagt upp til heildarætlanina, skúlin hevur eisini verið við í hesum arbeiði og tekur fult undir við hesum útspæli frá býráðnum. At man nú frá býráðsins síðu vil skáka sær undan hesi ábyrgd, er óskiljandi. Harafturat er tað ikki virðiligt at seta tørvin hjá øðrum samfelagsborgarum í kommununi upp ímóti tørvinum hjá skúlabørnum.

Tað eigur at vera ein sjálvsagdur rættur, at børn og ungdómar hava góðar umstøður til at nema sær kunnleika.

Innihaldsliga hava lærarar og leiðsla í Tórshavnar Kommunuskúla tikið eitt ódnartak fyri at fáa nútíðarhóskandi undirvísingarleist inn í skúlan og við góðum úrsliti. Undirvísingarleisturin í 10. flokkunum hevur seinastu árini verið ein sólskinssøga. Næmingar eru komnir frá øllum skúlum í kommununi til Tórshavnar Kommunuskúla at taka 10. floks prógv. Hetta borgar fyri, at áhugin fyri hesum undirvísingarleisti er góður, bæði millum næmingar og foreldur. Tórshavnar Býráð hevur ongan eyka kostnað havt av 10. floksnæmingunum í skúlanum og fer framhaldandi heldur ikki at hava tað.

Tórshavnar Kommunuskúli er sera væl fyri á tøkniliga økinum, harvið er skúlin førur fyri at geva næmingum nútíðarhóskandi undirvísing, har tøkni er sjálvsagdur lutur. Hetta er ein fyritreyt í nútíðar undirvísing, um hon skal geva meining. Hendan íløgan er gjørd í Kommunuskúlanum, sum tí einasta skúlanum í býnum, tvs. eingin eyka útreiðsla stendst av at fáa til vega tøkni til skúlan.

Tað er sera óvirðiligt at fara út og siga, at 10. floks næmingar hava við sær eyka kostnað, og brúka hetta sum undanførslu fyri umvælingarætlanini, sum allir avvarðandi partar hava góðtikið.

Vil Tórshavnar býráð heldur gera enn eina lappaloysn fyri skúlan, so er hetta eitt val sum Býráðið ger, og má standa til svars fyri - um so er, má havast í huga, at lappaloysnir í seinasta enda kosta meira!

Málini um framtíðar 10. flokk og málið um heildarætlanina fyri Tórshavnar Kommunuskúla eru tvey ymisk mál og eiga tí at verða viðgjørd hvør sær.

Í heildarætlanini skal atlit takast fyri bygningum skúlans. Hendan ætlan, sum langt síðani skuldi verið førd út í lívið av ábyrgdaranum á økinum, er púra klár at seta í verk.

Viðvíkjandi ætlanini við 10. flokkunum í kommununi eru heilt onnur atlit at taka, fyrst og fremst námsfrøðilig atlit. Tá grundleggjandi fortreytirnar sum 10.floksálitið er bygt á, ikki eru til staðar, má nýggjur leistur gerast.

Tórshavnar Kommunuskúli hevur uppbygt ein serligan undirvísingarleist fyri 10 flokk og á henda hátt víst í verki, at áhugi er fyri hesum aldursbólkinum. Hví taka næmingar úr tí skúlanum í kommununi, har miðvíst arbeiði er gjørt fyri at menna 10. floksundirvísingina við sera góðum úrsliti?

# Almannaverkið og læknaváttanir

TURIÐ JACOBSEN
ergoterapeutur

Bæði í mínum arbeiði sum ergoterapeutur og sum privatpersónur hoyri eg ferð eftir ferð um, at fólk verða send av Almannastovuni eftir kommunulæknaváttan til sovorðið, sum heilt tykist at sakna nakra sum helst fakliga og sakliga grundgeving.

Fólk, sum hava verið til serlæknaviðtalu á sjúkrahúsi og skulu søkja Almannastovuna um stuðul til heilivág, sum serlæknin ordinerar, verða send til kommunulækna eftir læknaváttan, eisini tá serlæknin hevur skrivað umsókn um stuðul fyri tey.

Fólk við viðføddum, varðandi breki og/ella sjúku, sum hava tørv á persónligum stuðli frá Stuðulstænastuni hjá Nærverkinum, skulu søkja stuðulin umvegis Almannastovuna. Eisini tey sendir Almannastovan eftir kommunulæknaváttan, áðrenn umsóknin fer til víðari viðgerð í Nærverkinum. Hesi eru sjálvdan ókend í Almannaverkinum, hava bæði gjøgnum pensiónsskipan og á annan hátt í nógvum førum, orsakað av teirra breki og sjúku alt teirra lív verið "kundar" har og hava frammanundan mangan í hópatali av læknaváttanum.

Børn undir 18 ár við fysiskum og mentalum viðføddum, varðandi breki hava lívslangan tørv á tænastum frá ymiskum fakpersónum t.d. fysio- ella ergoterapeuti. Eisini her mugu kommunulæknaváttanir til fyri at fáa játtan uppá tænasturnar frá Almannastovuni, ikki bara eina ferð, men ferð eftir ferð má farast til kommunulækna eftir læknaváttan til barnið, sum sum er føtt við breki og sum altíð fer at bera brek ...

Á flestu umsóknunum um stuðul frá Almannastovuni, er umsóknin samstundis ein heimild til, at Almannastovan kann innheinta neyðugar upplýsingar frá neyðugum instansum, t.d. læknum. Heintar Almannastovan so t.d. kommunulæknaváttan, sum umsøkjarin hevur givið loyvi til? Nei, fólk fáa boð um sjálvi at skaffa læknaváttanina. Nøkur eru so heppin, at tey hava ein kommunulækna, sum kann skriva váttanina, men mong eru, sum ongan fastan kommunulækna hava, tí eingin fastur kommunulækni er, har tey búgva.

Fyri uml. 3 árum síðan kom nýggj autorisatiónslóg í gildi í Danmark fyri heilsustarvsfólk. Ergoterapeutar og mær vitandi flestu føroyingar við útbúgving innan heilsuverkið, hava autorisatión frá Sundhedsministeriet. Sum ergoterapeutur við áhuga fyri økinum, fylgdi eg við í forarbeiðinum til donsku autorisatiónslógina og hvussu lógin kom at ávirka virksemið hjá ergoterapeutum í Danmark.

Upprunaliga var ætlanin hjá Sundhedsministeriet, at nýggja autorisatiónslógin skuldi áseta, at ergoterapeutar skuldu arbeiða undir læknaordinatión. Í viðmerkingum sínum til lógaruppskotið gjørdi danska Ergoterapeutforeningen (ETF) vart við, at um ergoterapeutar skuldu arbeiða undir læknaordinatión, fór lógaruppskotið at fáa stórar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri bæði kommunur og kommunulæknar, at kommunulæknarnir fóru at koma at virka sum "omsvøbsdepartement" og at vegurin hjá borgaranum til uppvenjing fór at blíva langur og bureukratiskur.

Viðmælini frá ETF um ikki at krevja, at ergoterapeutar skuldu arbeiða undir læknaordinatión, vórðu fylgd, so sambært nýggju autorisatiónslógini hava ergoterapeutar sjálvir fakliga ábyrgd fyri teirra viðgerð. Eg rokni við, at sama er galdandi fyri onnur autoriseraði heilsustarvsfólk í Danmark, t.d. fysioterapeutar.

Ræðumyndin hjá danska ergoterapeutfelagnum, um at tænastan til borgaran fór at blíva verri og meira kostnaðarmikil, um ásetingarnar um læknaordinatión bleiv staðfest í nýggju autorisatiónslógini, líkist ikki sørt veruleikanum í Føroyum í dag.

Tað er harmiligt, ikki minst havandi í huga, at vit dagliga hoyra um, at tað táttar í peningaliga á øllum økjum, samstundis sum verðandi, rættiliga bureukratisku fíggjar- og orkukrevjandi mannagongdir á almannaøkinum ikki tykjast at ávirka tænastuna til borgaran til tað betra, kanska tvørtur ímóti.

# Kommunan má duga sær fíggjarligt hógv

Minnilutin í Tórshavnar kommunu kann ikki taka undir við, at skattatrýstið hjá borgarunum hækkar næsta ár. Minnilutin heldur tað vera rættari, at kommunan lækkar sínar rakstrarútreiðslur 30 mió. kr, ið svara til ta ætlaðu skattahækkingina. Minnilutin skal vísa á, at rakstrarútreiðslurnar hjá Tórshavnar Kommunu eru øktar 200 mió. kr. um árið tey seinastu 5 árini, og tí má tað vera rættast, at eisini kommunan dugir sær hógv, nú tíðurnar ikki longur eru so góðar, sum tær hava verið.

Minnilutin heldur, at skattaborgarin í kommununi er nóg hart kroystur fíggjarliga, og vit vilja heldur, at kommunan nú vísir góðan vilja og repar seglini nakað við at minka rakstrarkostnaðin, ið er øktur óvanliga nógv tey seinastu árini.

Minnilutin átalar harðliga, at meirlutin brúkar tey gomlu sum skálkaskjól fyri at hækka skattin. Ellis- og røktarheim, skúlar og barnagarðar eru sannuliga bygdir í kommununi, uttan at skatturin er øktur av teirri orsøk. Nú misbrúkar meirilutin tey gomlu fyri at burturforklára sína vánaligu fíggjarstýring av kommununi við at siga, at um ikki skattaprosentið hækkar, so kann einki ellisheim byggjast yviri við Strond. Minnilutin heldur slík úttalilsir vera sera ódámilig og beinleiðis óseriøs.

Minnilutin metir fíggjargongdina í kommununi vera sera álvarsama, og hava vit í fleiri ár víst á ta skeivu gongdina. Eisini til valið í 2008 vístu vit á, hvussu Tórshavnar Kommuna fíggjarliga gerst veikari og veikari, tí at hon verður støðugt meiri skuldarbundin. Minnilutin vísti á, at hendan gongdin fór at hava við sær hægri skatt fyri borgaran. Vit fingu tíverri rætt. Vit mugu samstundis staðfesta, at vit ikki megnaðu at kunna borgaran nóg væl um trupulleikan.

Minnilutin vil samstarva fyri at fáa kommununa aftur á beina fíggjarliga kós. Men hvørja ferð okkurt verður gjørt í kommununi, verður sagt alment, at meirilutin í Tórshavnar býráð nú hevur gjørt ella fer at gera hetta ella hatta. Dentur verður lagdur á, at tað er meirilutin og ikki býráðið, ið ræður í høvuðsstaðnum, og harvið er alt seriøst samstarv við okkum í minnilutanum útilokað. Meirilutin ræður og eigur ábyrdina av teirri skeivu fíggjarligu gongdini í kommununi.

**Sjúrður Olsen,**
fólkafl.
**Jan Christiansen,**
fólkafl.
**Vagnur Johannesen,**
fólkafl.
**Annfinn Brekkstein,**
sambandsfl.